gult cyan magenta svart



hon hekk um hálsin á Jóani.

Løtu seinni skiltust hesi bæði ungu, sum høvdu droymt fagrar dreymar um vónríka tíð saman í kærleika, kærleika, sum tey høvdu givið hvørjum øðrum í fyrstu ungdómstíð síni. Hesin kærleiki varð nú slitin av jarðargrískum, bonskum menniskjum, og mátti tí geva sár, sár, sum seint lektist og altíð fór at bera greflig arr.

Brúdleypið var um veturin í Norðfirði. Nakað av fólki var úr Stóruvág, ætt og kenningar hjá Durutu. Jóhanna var nakrar dagar undan farin til Norðfirðar. Duruta hevði biðið hana komið við sær. Jóhanna var í Norðfirði til eftir brúdleypið.

Um brúdleypið siga vit onki og enn minni um brúdleypsnáttina hjá teimum báðum. Duruta hevði sagt Tróndi, at hon var góð við annan mann, og hon kundi ongan annan elska. At hon hevði sagt ja, til at verða kona hansara, var tí, at hon varð noydd til tað av faðiri sínum. Nú varð hon vígd at vera kona hansara, og tað skuldi hon royna at vera, men tað kom at verða uttan kærleika, tí hjarta hennara var eftir hjá dronginum í Yndisoynni. Soleiðis byrjaði hjúnalag teirra.

Nú vóru liðin nøkur ár. Duruta og Tróndur høvdu fingið børn. Duruta helt húsarbeiðið og alt, ið hoyrdi til hennara starv sum matmóður á garðinum í besta standi. Hon dugdi væl at fara við arbeiðsfólki. Tey gjørdu tað, tey skuldu, uttan at hon álegði teimum tað. Tróndur var eisini raskur maður, sum dugdi at fara væl við arbeiðsfólkinum.

»Tróndur var góður við Durutu. Hann royndi at gera alt tað góða, hann kundi fyri hana, men hon broyttist ikki; hon var altíð líka køld ímóti honum. Hann kundi ikki vinna hennara kærleika, og tað var ikki sørt, hann øvundaði manninum í Yndisoynni, sum átti hennara hjarta.«

Bæði vóru tey góð við síni børn, men tað var sum tey ikki kundu gleðast saman um tey. Sýndi hann børnunum kærleika, so helt hon seg burtur frá teimum, og sýndi hon teimum alsk, og hann kom til, rímdi hon frá teimum. Hetta kom av, at hjúnalagið varð bygt á skeivum grundarlagi uttan kærleika millum hjúnini.

Ein dagin rópaði grindaboð í Stóruvág. Boðini komu úr Norðfirði. Nakrir bátar fóru í grind. Jóan var við einum av bátunum. Tað gekk væl at reka grindina, men við drápinum gekk tað meira seint. Hon varð hildin til fleiri ferðir. Tað gekk tað mesta av degnum, áðrenn alt varð dripið, og tá var hvør maður móður og svangur.

Grindamenninir vórðu allir bodnir í húsini. Stóruvágsmenn vórðu allir bodnir inn í Hólar, heim Durutu og Tróndar. Tróndur var blíður við bygdarmenninar hjá konu síni. Menninir takkaðu og fóru niðan í Hólar. Duruta var blíð og beyð teimum innar. Inngongdin var í neðra og trappa uppá. Heldur myrkligt durunum, og áðrenn Durutu vardi, stóð Jóan framman fyri henni og tók í hond hennara og bað góðan dag. Hon kvakk við. Kendi hvussu hjarta hennara fór at sláa, men skjótt fekk hon tamarhald á sær.”Góðan dagin,” segði hon. Ikki fekk hon sagt meira. Fólkið trokaði á, men Jóan helt seg síggja, at hon var fegin at síggja seg. Hon sá á eygum hennara, at hon var hansara hóast langan skilnað. “Um hann bara kundi fevnt hana. Nei, hann kundi ikki tonkja so, hon var gift øðrum manni, og onki gjørdist við tað.

Menninir vórðu bodnir innar í stovuna, har borðreitt varð fyri teimum. Hon stákaðist mest í roykstovuni, meðan ein genta bar innar í stovuna. Tróndur bað Durutu verða blíða við menninar og geva teimum nógv at eta og drekka. Men tað var óneyðugt. Duruta visti, hvat hon skuldi sýna bygdarmonnum sínum av blíðskapi. Men Tróndur segði hetta mest sum eina umbering fyri seg, tí hann mátti fara av stað aftur. Hann var grindaformaður og hevði tí nógv um at vera.

Umsíðir fóru menninir at gera seg til at fara avstað aftur. Teir takkaðu Durutu fyri blíðskapin og fóru aftur í grindavásið, men nú vóru teir mettir og í góðum hýri. Seinastur í durunum var Jóan. Hann tók um hond hennara og takkaði fyri seg. “Tað var gott at síggja teg,” segði hann. “Ja, í líka máta, tað var gott at síggja teg,” segði hon. “Kemur tú ikki niðan aftur í kvøld? Tú ert tann sami fyri meg enn sum áður,” segði hon og kysti hann. Ongin sá tey, tí hinir høvdu skund og vóru farnir. “Jú, eg komi kanska, um tað liggur fyri,” segði hann og hugdi í eygu hennara og sá tað, hann vildi síggja: kærleika hennara til sín. “Jú, eg komi,” tók hann uppaftur og lat klinkuna aftur.

Tá ið menninir fóru úr Hólum, fóru teir í dansin. Har var nógv fólk saman komið. Øll høvdu tey ymsik mál í síni ætlan. Tó var tað onkur, sum ikki visti av, at hann var komin í dansistovuna. Av ótta fyri at fáa ov lítið at drekka og harvið ikki verða nóg fullur, hevði hesin tikið til sín í so stórum, at grindin helst hevði tikið við salti, áðrenn hann kom fyri seg aftur.

Eldru menninir vóru mest komnir at dansa og kvøða saman við øðrum fremmandafólki. Teir livdu seg inn í kvæðið. Grindadrápið hevði øst teir upp. Teir høvdu fingið nógv blóð at flóta í dag, og meðan teir kvóðu ímyndaðu teir sær, at tað vóru teir, sum høvdu svørðið í hond og riðu í bardaga og høgdu niður frá hond. Blóðið fleyt út um vøllin, og mannfallið var stórt. Sjálvir mistu teir ongan mann, einans hest og okkurt svørðið. Men tá kvæðið var at enda komið, var onki blóð á gólvinum. Hesturin mundi vera áttamannafarið í Hólum. Svørðini vóru nøkur vákn, ið brotnaðu í drápinum.

Tey ungu komu fyri at hitta onnur ung. Nógv teirra høvdu ikki hitst áður. Tey fingu hug á hvørt øðrum. Summi gjørdust góð fyri lívið.

Jóan hevði ikki ró á sær. Hann sá fyri sær eyguni á Durutu, har hon stóð í durunum. Skuldi hann fara niðan í Hólar? Onkur beyð honum at drekka, men tað hugaði honum lítið. Skuldi hann hitta Durutu, vildi hann ikki vera drukkin. Tá ið komið varð ímóti midnátt, fór hann úr dansinum. Hann fór burtur frá fólki, fann sær eina leið, har onki fólk var. Tá ið hann nærkaðist Hólum, gekk hann heldur spakuliga. Kannaði um nakar sá seg, men har var kvirt allastaðni.

Ljós var í roykstovuni, tað sá hann. Roykstovuvindeygað vendi niðaneftir, og jarðarmunur var, har húsini stóðu, so hann sá inn í roykstovuna. Har var ongin inni. Men inni mundi Duruta vera, kanska einsamøll. Hann mátti inn. Hon hevði eisini biðið hann koma. Hann fór innar í durin, gekk spakuliga upp trappurnar, bankaði uppá. Tá ongin svaraði, tók hann í klinkubandið og læt upp. Nei, ongin var inni. Men so fór stovuhurðin upp, og Duruta stóð ímillum klovastavirnar. “Kom innar í stovuna,” segði hon. “Eg vónaði, at tú fórt at koma,” legði hon aftrat. “Ja, eg mátti koma at hitta teg,” segði hann. Duruta sløkti lampuna, tók í hond hansara, leiddi hann gjøgnum stovuna innar í kamarið, har sum hjúnini svóvu. Har vóru tvær sengur. Onnur var til børnini. Jóan gekk fram at songini og hugdi at børnunum. Tey svóvu trygt. Eitt hevði koyrt dýnuna av sær. Duruta kom yvir til hansara. Saman stóðu tey eina løtu tigandi og hugdu at børnunum.

»Men so tók hon aftur í hond hansara, gekk yvir at songini hjá hjúnunum. Løtu seinni gav hon seg til Jóan. Gav seg við likami og sinni. Hon hon visti, at hetta var bæði fyrstu og einastu ferð, at hon og Jóan komu at vera í song saman, og hon vildi njóta løtuna við tí manni, sum hon hevði elskað. Hon vildi geva honum alt og soleiðis sýna honum, at hon framvegis elskaði hann.«

Táið Jóan var farin út aftur gjøgnum bakdyrnar seinni um náttina, lá Duruta og hugsaði. Her hevði hon ligið saman við manni, hon ikki var gift við, meðan Tróndur, maður hennara, lá úti og stríddist við at fáa grindina til høldar. Hon hevði brotið lyftið, hon hevði givið Tróndi fyri Gudi og monnum. Men hon hevði ongar skuldarkenslur. Gud mundi skilja hana og fyrigeva henni. Væl hevði Gud sagt, at hon skuldi vera manni sínum undirgivin, men hon varð noydd at manni sínum. Hevði Gud sagt tað, at ein onki hevði at siga í so stórum máli sum at velja mann sín? Hon var vaksin og vildi ráða sjálv fyri, hvørjum hon skuldi giftast við. Tað áttu foreldrini ikki at ráða fyri. Og hvussu stóð skrivað í Halgubók? Bleiv Rebekka ikki spurd, um hon vildi verða kona Ísaks? Jú, tað var hon. Rebekka fylgdi við av fríum vilja.

Tá Jóan ikki møtti til at skera upp, ilskaðust teir yngru grindamenninir; spurdu hvar Jóan mundi vera. Teir høvdu sæð hann í dansinum. Mundi hann hava funnið sær gentu og lat teir skera upp einsamallar, meðan hann fjasaðist við konufólk. Teir eldru menninir harkaðu, hugdu upp á hvønnannan, tagdu. Ikki var vert at siga ov nógv. Men teir kendu støðuna.

Duruta kom ongantíð aftur í føðioyggj sína, Yndisoynna.

## Norðurlendska tænastumannaumbýti

**Freistin er longd til 16. februar**

Vegna tess, at peningur er eftir at søkja fyri ár 2001, verður freistin longd til 16. februar 2001.

Norðurlendska tænastumannaumbýtisskipanin ger tað møguligt hjá starvsfólk í landsfyrisitingini at fara til eitt av norðurlondunum at arbeiða í eina tíð.

Stuðul verður veittur til at gjalda ferða- og uppihaldsútreiðslur hjá luttakara.

Endamálið við skipanini er at fremja norðurlendskt samstarv og geva luttakarunum kunnleika til m.a.fyrisiting og lóggávu í hinum norðurlondunum.

Føroyar hava fyri ár 2001 fingið tillutað kr. 61.000,-. at nýta til hesa skipan.

Umsóknarfreistin er 16. februar 2001. Umsóknir, sum koma inn aftaná hesa dagfesting, verða bert viðgjørdar, um peningur er tøkur.

Nærri upplýsingar um skipanina fáast við at venda sær til Løgmansskrivstovuna — nýskipanardeildina og fáast eisini við at fara á heimasíðuna hjá Nordisk Ministerråd.

http: //www.norden.org og hyggja undir Støtteordninger og Nordisk utbytestjänstgöring

Løgmansskrivstovan
Tórshavn 18-12-00



# Fyrstu ferð tunfiskur er landaður í Føroyum



*»Leitisteinur« hjá felagnum Thor landar tunfisk við bryggjuna hjá Skipafelagnum*

Føroyingar hava fiskað tunfisk í nøkur fá ár. Bátarnir hava landað í Scrabster, og síðani er fiskurin pakkaður í serstakar flúgvieskjur. Síðani hevur Skipafelagið Føroyar tikið sær av flutninginum loftvegis um London til Tokyo í Japan.

Tunfiskur er dýrur fiskur og kann koma upp í heilar 200 til 300 kr. pr. kg feskur.

Týsdagin landaði Leitissteinur sjey tons av tunfisk og 15 tons av hávi. Tað er felagið, Thor sum er útflytari av tunfiskinum. Fiskurin er ikki fiskaður av føroyskari kvotu. Talan er um frystan tunfisk, men hann hevur tó næstan líka góðan prís sum feskur tunfiskur. Grundin er tann, at fiskurin er snarfrystur niður á –60 gradir, afturímóti vanligari frysting, sum er ímillum –18 og –28 gradir.

Eykaarbeiði og orka skal til at halda temperaturinum niðri á heilum –60 gradum. Fiskurin verður sendur við heilt speciellum bingjum, kallaðar Super Freezers. Fyri at fiskurin ikki skal missa kuldan undir landingini, verður bingjan, sum fiskurin skal sendast við, sett saman við eina »stuffi« bingju við hol á takinum, sum víst á myndini. Temperaturin verður kannaður tvær ferðir um dagin, og trýggjir kuldamálarar verða settir inn í bingjuna.

Fiskurin verður sendur við Skipafelagnum Føroyar og fer síðani víðari við Maersk til Tokyo. Um ein mánað verður hesin fiskurin seldur á fiskauppisølu í Tokyo og helst etin sum sushi.

# Jólamatur uttan fylgjandi búkilsku

Lunkaðu jólarættirnir skulu borðreiðast kókandi heitir, og restin av matinum skal í kuldaskáp sum skjótast.

Hetta eru boðini, um tú ætlar at sleppa undan búkilsku av bakteriu áðum í hesum matmikla mánaði, december.

Maturin er í hesum døgum høgt í metum og sera týdningarmikið í skapanini av hita og samanhaldi, hugna og mentan. Men við øllum er ein ranga. Bakterian! Latið ikki hesa smáveru spilla jólahaldini, jóladøgurðan og jólahugnan, men fylgi nøkrum fáum góðum ráðum í sambandi við matgerð og goymslu.

Hitið matin væl og virðiliga ígjøgnum

Ein lunkaður rættur skal hitast væl og virðiliga ígjøgnum, og borðreiðast kókandi heitur. Hetta ger, at møguligar sjúkuelvandi bakteriur verða dripnar. Skal maturin hitast upp aftur dagin eftir, seti hann so í kuldaskápið beint eftir lidna borðhaldið, og hiti hann væl og virðiliga ígjøgnum aftur áðrenn næstu borðreiðing. Heitir rættir eiga bert at verða uppafturhitaðir eina ferð.

### Matrestir í kuldaskáp

Allar matrestir skulu koyrast í kuldaskáp við 5 stig ella lægri skjótast gjørligt aftaná eitt borðhald. Maturin fær ein hita millum 20 stig og 40 stig, meðan hann stendur á borðinum. Hettar er besti vakstrarhiti hjá bakterium. Er ætlanin at nýta restirnar dagin eftir, so koyri matin í kuldaskápið sum skjótast.

Oftani verður matur gjørdur dagin fyri, hann skal etast. Í tílíkum førum er tað týdningarmikið, at bæði rættir, sum skulu borðreiðast heitir, og tískil fáa eina hitaviðgerð áðrenn teir skulu etast, so sum kjøtfrikadellur, livurposteig o.a., og kaldir rættir, so sum rísgreytur til rísalamande, sild, o.a. verða koyrd í kuldaskáp við 5 stig, so skjótt teir eru lidnir og dampurin er stilnaður av.

### Ruddið kuldaskápið

Allar matvørur sum spillast lætt, so sum kjøt, viðskeri, døgurðarættir og aðrir rættir til kalda borðið, eiga altíð at verða goymdir í kuldaskápi við í mesta lagi 5 stig. Nærum ongar bakteriur vaksa við 5 stig ella lægri.

Maturin í kuldaskápinum skal ikki liggja ov tætt, tí so verður ov lítil luftringrás ímillum vørurnar, og hitin kann hækka. Fer hitin upp um 5 stig, skal termostaturin regulerast, soleiðis at hitin kemur niður aftur á 5 stig ella lægri.

Byrja jólafyrireikingarnar við at vaksa og rudda upp í kuldaskápinim. Koyrið tann matin aðrastaðni, sum ikki krevur kuldaskápshita, so sum heilkonservis, frukt, grønmeti, øl og sodavatn.Hyggið eftir goymsluforskriftunum á pakninginum á matvørunum. Ávísar matvørur kunnu goymast við hægri hita enn 5 stig, áðrenn tær verða ásettar.

Ráður matur og matur klárur at eta, skal haldast væl atskildur

Tað er ógvuliga týdningarmikið, at ráur matur ikki kemur í samband við lidnan mat. Um bakteriur frá ráðum kjøti, flogfenaði, fiski, eggum o.ø. koma á lidnan mat, kann ein gerast sjúkur av lidnu rættunum, hóast teir eru bæði væl hitaðir og køldir skjótt niður.

Best er at gera ein rætt í senn, og vaksa hendur, íløt, knívar og onnur amboð hvørja ferð, skift verður millum matsløgini. Soleiðis slepst undan at spreiða bakteriur við hondunum og amboðum ímillum ymisku matsløgini.

Vit ynskja tykkum øllum eini gleðilig jól

**Erla m. Jensen**
**Matvørudeildin**

